# SETTUR FASTUR FYRI EITT SMS

# KAMERUN

## FOMUSOH IVO FEH




**Fomusoh Ivo Feh, millum vinirnar bara Ivo, skuldi júst byrja á universitetinum, tá ið eitt sms broytti alt.**

Seint í 2014 fekk tann tá 25 ára gamli kamerunarin eitt sms frá einum vinmanni í herinum. Í teimum speisku boðunum skemtaði vinmaðurin við, at tað hevði verið ólíka lættari at verið upptikin í tann vápnaða bólkin Boko Haram, enn tað er at sleppa inn á universitetið ella at finna arbeiði, tá ið tær vantar royndir.

Boðini vóru soljóðandi:

*"Boko Haram sóknast eftr ungum, 14 ár og eldri, til hertænastu. Upptøkutreytir: 4 GCE-fak og eitt teirra skal vera átrúnaður."*

Ivo helt boðini vera stuttlig og sendi einum vinmanni tey. Men lærarin hjá vinmanninum sá boðini og boðaði politinum frá. Politiið handtók vinmannin í oktobur, og tann 13. desembur varð Ivo eisini handtikin.

Ivo hevur ikki fingið góða viðferð. Tann fyrsta mánaðin visti familjan einki, hvat ið var vorðið av honum. Frá miðum januar til apríl bundu starvsfólk í fongslinum øklarnar á honum og vinmanninum saman við leinkjum.

Myndugleikarnir hava ákært Ivo og vinmannin fyri at royna at skipa fyri uppreistri ímóti statinum.

Í løtuni sita teir í varðhaldi, meðan málið gongur sína gongd við ein franskmæltan hernaðardómstól. Ivo og vinmaðurin duga best enskt, men av teimum seks ferðunum, teir hava hava verið í rættinum, hava teir bara eina ferð havt ein umsetara. Teir kunnu verða dømdir millum tíggju og tjúgu ára fongsul.

**At senda eitt sms er eingin brotsgerð. Krev, at Kamerun sleppir øllum ákærum móti Ivo og vinmanninum og sleppir teimum leysum.**

***"Øll hava rætt til áskoðanar- og framsagnarfrælsi; hesin rættur fevnir um frælsi at hava áskoðanir uttan uppíblanding og at leita sær, taka ímóti og lata upplýsingar og hugsanir gjøgnum ein og hvønn miðil og uttan mun til landamørk."***

**Grein 19, ST-yvirlýsingin um mannarættindir**

# ÁHEITANARBRØV

**Skriva tí kamerunska forsetanum eini boð.**

**Byrja við: "Dear President,"**

- Sig, hvør tú ert, og hví tað ørkymlar teg, at Ivo Feh og vinmaðurin sita í varðhaldi.
- Bið hann sleppa øllum ákærum ímóti teimum og sleppa teimum leysum beinanvegin.

Dear President Biya,

I am writing to express my concern about the detention of Fomusoh Ivo Feh and his friend who have been imprisoned awaiting trial for sending a text message.

Please ensure that all charges against them are dropped and that they are freed without delay.

Sincerely,

## Send boðini higar:

President of the Republic of Cameroon

His Excellency Paul Biya

P.O. Box 95

Yaoundé, Cameroon

# SAMHUGABRØV

**Vís Ivo, at tú stuðlar honum.**

Send Ivo og vinmanninum eini stuðuls- og vónarboð, sum hjálpa teimum at halda lív í vónini.

Fomusoh Ivo Feh
Délégation régionale de l´administration pénitentiaire
Prison principale de Yaoundé
s/ c Prison centrale de Yaoundé
B.P. 100
Yaoundé, Cameroun



# ÁHEITANARBRØV

**Endamálið** við einum áheitanarbrævi er at fáa móttakaran at fremja eina gerð, ið ger at rættindini hjá einum øðrum menniskja verða hildin. Ofta verða áheitanarbrøv send til myndugleikapersónar sum t.d. kongalig, forsetar, forsætisráðharrar ella borgmeistarar, tí hesir persónar hava skyldu til at taka sær av teimum brotum, sum henda.

**Orðaval -** í einum áheitanarbrævi hevur stóran týdning fyri um móttakarin tekur brævið í álvara. Tað er umráðandi at vera fólkaligur, óansæð hvat móttakarin hevur gjørt, ella kanska ikki hevur gjørt.

**Dagfesting -** fyri nær brævið hjá tær er skrivað. Dagfestingin verður skrivað ovast til høgru.

**Heilsan til móttakaran.** Brúka bara heitið á móttakaranum, t.d. Tygara kongaliga hátign, Frú forseti ella Hr. borgmeistari.

**Inngangur -** Stutt frágreiðing um endamálið við brævinum.

**Áheitan -** Kann eisini nevnast høvuðsteksturin í brævinum. Her verður greitt frá trupulleikanum og grundgevingunum fyri at móttakarin eigur at hjálpa við at loysa teir.

**Endi -** Tað er eitt gott hugskot at enda brævið fólkaliga, t.d. Vinarligar Heilsanir.

**Fulla navnið hjá tær.**

# SAMHUGABRØV

**Endamálið** við einum samhugabrævi er at geva móttakaranum eina vón og eina trúgv uppá at hansara ella hennara stríð fyri rættvísi fer at eydnast. Brævið vísir móttakaranum at hann ella hon ikki eru gloymd og ikki stríðast einsamøll, men at umheimurin gevur sær far um tey brot, ið ganga fyri seg og stríðist fyri at mannarættindini hjá móttakaranum verða hildin.

**Innihaldið -** Tað eru nógvir møguleikar fyri hvat tú kanst skriva í einum samhugabrævi, og hvussu tú kanst skriva tað. Tú kanst skriva stutt ella langt. Tekna eina mynd ella skriva eina yrking. Tað er púra upp til sendaran at royna at meta um, hvat hann heldur at móttakarin hevur brúk fyri at hoyra. Tann, ið fær eitt samhugabræv er ofta tann persónurin, sum er fyri brotum á mannarættindini.

Brævið kann eisini sendast til avvarandi hjá persóninum, sum er fyri brotum. Tað vil siga familju, vinir og líknandi. Í nøkrum førum er tað ikki gjørligt at senda samhugabrøv beinleiðis persónin, sum er fyri brotum, tí myndugleikarnir, ið standa fyri brotunum forða fyri tí.

**Dagfesting -** fyri nær brævið hjá tær er skrivað. Dagfestingin verður skrivað ovast til høgru.

**Heilsan til móttakaran.**

**Innihald -** Hygg at frágreiðingini omanfyri.

**Endi -** Tað er eitt gott hugskot at enda brævið fólkaliga, t.d. Vinarligar Heilsanir ella Kærar heilsanir.

**Fulla navnið hjá tær.**